**Góðu íðkarar, foreldur og áhoyrarar,**

Ítróttafelagið Smæran er av sonnum ein sólskinssøga. Nú vit í dag hátíðarhalda tvey ára dagin hjá felagnum kunnu vit róliga staðfesta, at felagið er livandi – ja sprell-livandi. Frálíka sosial og fysiska tilboðið til rørslu- og menningaratarnað hevur verið væl móttikið.

Úr øllum aldri hava limir tysjað til felagið at spæla borðtennis, svimja, íðka frælsan ítrótt og boccia og longu nú eru nærum 50 virknir limir. Eldsálirnar í Smæruni gera hvørja viku eitt rimmar arbeiði. Sum landsstýriskvinna eri eg ómetaliga errin av og seti stóran prís upp á sjálvsbodna arbeiðið, sum tit øll gera. Uttan tykkum, ja so var einki tilboð um skipaða venjing.

Ídnu og ágrýtnu venjararnir fáa tað besta burturúr íðkarunum. At tað verður lagt nógv fyri í teimum ymisku ítróttagreinunum bera góðu úrslitini bæði í heimligu kappingunum og kappingunum úti í heimi boð um. At Smæran er eitt felag í rívandi menning vísir góða umboðanin hjá felanum á Special Olympics í Athen í fjør, tá ið Rannvá, Meiken, Heidi, Súsanna, Robert og Unn vóru so heppin at sleppa at royna seg á leikunum í Athen, og tað við góðum úrslitum.

Stuðulin kring felagið er alt avgerandi. At síggja so nógv fólk møta til frálíka og fjølbroytta familjutiltakið her á Løgmannabreyt í dag vísir, at tit hava trúgvar stuðlar. Øll foreldrini geva sanniliga sítt íkast, bæði í nevndararbeiði, fyriskipan og sum hjálparfólk. Vit mugu heldur ikki gloyma røsku stuðlarnar, sum gera sítt til, at ber til at skipa fyri kappingum mitt í viku. Takk skulu tit øll hava fyri tað.

Sum landsstýriskvinna kann eg ikki annað enn fegnast um, at ítróttur er eitt av økjunum, har fægst forðingar eru fyri fólk við serligum avbjóðingum. Skjótt eru trý ár liðin, síðan vit settu í gildi ST sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Við ST-sáttmálanum er kósin løgd.

Visjónin og okkara avbjóðing er at menna einar Føroyar, ið geva rúmd fyri øllum. Sum landsstýriskvinna kann eg ikki annað enn ásanna, at nakað er á mál fyri røkka hesi visjón.

Tí er tað sera hugaligt hjá mær at síggja, at áhugafeløg sum Smæran eisini vilja gera sítt til, at handikapsáttmálin er eitt livandi skjal. Grein 30 í sáttmálanum, snýr seg júst um at vera virkin frítíðarlívi og ítrótti.

Íðkarar, foreldur, stuðlar og nevndarlimir, hjartaliga til lukku við 2 ára føðingardegnum. Vónandi fáa vit øll ein spennandi dag saman, har tað verður møguligt at royna alt frá boccia til minigolf og blása-píl. Sum fyrrverandi landssliðssvimjari skuldi eg kanska bjóða onkrum av røsku svimjarunum í Smæruni av. Tað hevði verið ein stuttlig og øðrvísi avbjóðing hjá mær!

Her at enda vil eg siga stóra takk fyri, at eg kundi sleppa at siga nøkur orð her í dag og ynskja felagnum alt tað besta framyvir.

Takk fyri!

Annika Olsen, landsstýriskvinna í almannamálum